Tjóðskjalasavnið

## Dømi um atgeingisfreistir

**GG: Persónsmál eru alment atgongd eftir at málini eru endaði, t.v.s. tað seinasta skrásetta dato í einum málið.**

### 80 ára freist:

**Familjurættarlig mál:**
Ættleiðing, faðirskapsmál, hjúnalag, sundurlesing og hjúnaskilnaður. Mál um foreldramyndugleika, samverurætt, arvamál og mál um heimarætt.

**Revsirættarlig mál:**
Kanningar, ákæra, dómur, útinning av revsing.

**Sosialmál:**
Barnapengar, barnaverndareftirlit, uppihaldspeningsmál. Mál um sosialar klientar og gjøld.

**Heilsumál:**
Jarðarmøðurprotokollir, sjúklingajournalir, deyðsváttanir, heilsunevndarmál.

**Starvsfólkamál:**
Mál um setan, eftirløn og onnur tænastulig viðurskifti hjá alment settum.

**Grundtilfar við persónsupplýsingum:**
Kirkjubøkur og fólkateljingar.

**Leitiamboð hjá stovnum:**
Journalir og brævalistar/kopibøkur.

**Upplýsingar um privat og/ella fíggjarlig viðurskifti hjá einstaklingum**

**Gerðabøkur hjá Landsstýrinum**

### 30 ára freist:

Øll onnur mál, um ikki serligar reglur eru gjørdar, eru alment atgongd, tá ið tey eru 30 ár.

### 75 ára freist:

Skjøl hjá donskum ríkisstovnum eru undir danskari skjalasavnslóg, og eru alment atgongd aftaná 75 ár eftir at málini eru endaði.